## Andrew spældi aftur fyri Amager



Sunndagin spældi Fremad Amager ímóti HIK í donsku 1. deild. Dysturin var á heimavøllinum hjá Fremad Amager. Martin Skov legði Amager fram um 1-0, men HIK javnaði fyri steðgin. Eftir fýra minuttir í seinna hálvleiki vendi alt upp og niður, tí hesa løtuna fekk Fremad Amager blackout, og HIK skoraði heili trý mál eftir ongari tíð. Andrew av Fløtum var settur á vøllin, tá ið eitt gott korter var eftir, men hann kundi ikki venda gongdini, og Fremad Amager tapti 4-1.

## ÍF Føroyar á TV2

Leyagrdagin spældi føroyska útisetaliðið í Keypmannahavn, ÍF Føroyar, dyst ímóti FC Bornholm. Eitt upptøkulið frá TV2/Bornholm var til staðar, og rásin sendi eitt innslag frá dystinum leygarkvøldið. ÍF Føroyar vann dystin 3-1 við málum, sum Heini í Skorini, Jørgein Meitelberg og Ken Nónklett skoraðu. Á heimasíðuni hjá ÍF Føroyar, sum er fotboltur.dk, er ein slóð til innslagið hjá TV2/Bornholm.

økti. Eftir framlegging í vinsta borð lyfti hann hegnisliga innfyri, har Sonni L. Petersen við høvdinum stýrdi bólin í mótsatta síðunetið.

EB/Streymur royndi at stríðast fyri at fáa eitt mál undan steðginum. Í staðin var tað NSÍ, sum økti til 3-0. Ytstu miðvallararnir skiftu ofta pláss. Ein minutt undan hvíldini fekk sera væl upplagdi Christian Høgni Jacobsen bóltin heilt úti í borðinum og eitt sindur frammanfyri miðstrikuna. Hann setti ferð á við kós móti brotsteiginum. Fleiri av gestunum hugdu at honum og bakkaðu undan, meðan teir kannaðu hvat viðspælararnir hjá Christian Høgna, sum ofta vóru skjótir fram, vóru. Landsliðsspælarin takkaði fyri friðin og náðirnar, tá ið hann var átjan metrar úr málinum, smekkaði hann til, og bólturin smeyg sær dygst inn við nærru stólparótini.

Í síðsta enda vístu fínu málini í 1. hálvleiki seg at vera nóg mikið til NSÍ sigur. Men síðstu løtuna vísti EB/Streymur, at teir skulu ikki hava so langt tjóður fyri at sleppa framat aftur.

# Fernando Alonso dominerar aftur í ár

**Við sínum fimta sigri hetta kappingarárið vísti Alonso, at hinir mugu berjast um annaðplássið, tí hann verður næstan heilt víst heimsmeistari aftur í ár.**

**FORMEL 1**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Við sínum fimta sigri í ár dróg Fernando Alonso enn einaferð frá kappingarneytunum*

*Mynd: Scanpix*

Við sera sannførandi koyring vann heimsmeistarin Fernando Alonso bretsku formil 1 koyringina á Silverstone breytini. Í kappingini um heimsmeistaraheitið liggur ungi spaniumaðurin nú 23 stig frammanfyri einasta veruliga avbjóðarin Michael Schumacher, ið fekk annað pláss.

Fyri nøkrum árum síðan, var tað ein vís kvinna, ið lýsti formil 1 á hendan hátt: Formil 1 er ein ítróttur har 20 mans í dýrum bilum koyra runt og runt, og at enda vinnur Michael Schumacher. Hetta er nú broytt, og hóskandi er ivaleyst at lýsa formil 1 soleiðis: Formil 1 er ein ítróttur har 22 mans í dýrum bilum koyra runt og runt, og at enda vinnur Fernando Alonso.

Fernando Alonso í Renault er ein ótrúliga fullkomin pakki, ið vinnur alt og ongantíð ger eina villu ella hevur tøkniligar trupulleikar. Nú annað ár á rað seta tey øll onnur upp á pláss.

Kimi Räikkönen lá stóran part av koyringini sum ein buffari millum Alonso og Schumacher, og forðaði í veruleikanum fyri, at hetta nakrantíð veruliga gjørdist spennandi. Í síðsta pitstoppi slapp Schumacher framvið honum, tá hansara pittlið brúkti heili 8 sekund til at skifta dekk og fylla bensin á bilin. Móti endaðum hótti Giancarlo Fisichella triðja plássi hjá Räikkönen, men slapp tó ikki framvið honum.

Fyri bretsku koyrararnar gjørdist dagur einki serligur. Jenson Button byrjaði á 19. plássi, men koyrdi seg flott upp á 12. pláss, áðrenn eldur kom í hansara Honda. Hin bretin, skotski David Coulthard megnaði ongantíð at gera nakað hóvasták burtur úr sær og endaði á 12. plássi.

Amerikumaðurin Scott Speed fekk ein keðiliga høvuðsleiklut, tá hann eitt sindur ófantaliga royndi at koma framvið Ralf Schumacher á fyrsta umfari, bilarnir raktu hvør annan, og Ralf Schumacher rakti síðan Mark Webber. Hetta gjørdist endin á degnum fyri allar tríggjar. Nú verður málið kannað, og tað er ikki ósannlíkt, at Scott Speed verður revsaður og møguliga ikki sleppir at koyra á heimabreytini í USA. Næsta koyring er í Kanada, men síðan verður USA á skránni, so um Speed fær bann í tvær koyringar, sleppur hann ikki at luttaka.

### Úrslitið á Silverstone

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso | Renault | 10 |
| 2 | Michael Schumacher | Ferrari | 8 |
| 3 | Kimi Räikkönen | McLaren-Mercedes | 6 |
| 4 | Giancarlo Fisichella | Renault | 5 |
| 5 | Felipe Massa | Ferrari | 4 |
| 6 | Juan Pablo Montoya | McLaren-Mercedes | 3 |
| 7 | Nick Heidfeld | Sauber-BMW | 2 |
| 8 | Jacques Villeneuve | Sauber-BMW | 1 |
| 9 | Nico Rosberg | Williams-Cosworth | |
| 10 | Rubens Barrichello | Honda | |
| 11 | Jarno Trulli | Toyota | |
| 12 | David Coulthard | RBR-Ferrari | |
| 13 | Vitantonio Liuzzi | STR-Cosworth | |
| 14 | Christian Klien | RBR-Ferrari | |
| 18 | Christijan Albers | MF1-Toyota | |
| 16 | Tiago Monteiro | MF1-Toyota | |
| 17 | Takuma Sato | Super Aguri-Honda | |
| 18 | Frank Montagney | Super Aguri-Honda | |

### Komu ikki í mál

Jenson Button Honda
Ralf Schumacher Toyota
Mark Webber Williams-Cosworth
Scott Speed STR-Cosworth

### HM fyri koyrarar

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso | Spania | 74 |
| 2 | Michael Schumacher | Týskland | 51 |
| 3 | Kimi Räikkönen | Finnland | 33 |
| 4 | Giancarlo Fisichella | Italia | 32 |
| 5 | Juan Pablo Montoya | Kolumbia | 26 |
| 6 | Felipe Massa | Brasilia | 24 |
| 7 | Jenson Button | Ongland | 16 |
| 8 | Rubens Barrichello | Brasilia | 13 |
| 9 | Nick Heidfeld | Týskland | 10 |
| 10 | Ralf Schumacher | Týskland | 8 |
| 11 | David Coulthard | Skotland | 7 |
| - | Jaques Villeneuve | Kanada | 7 |
| 13 | Mark Webber | Avstralia | 6 |
| 14 | Nico Rosberg | Týskland | 4 |
| 15 | Christian Klien | Eysturríki | 1 |

### HM fyri lið

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Renault | 106 |
| 2 | Ferrari | 75 |
| 3 | McLaren-Mercedes | 59 |
| 4 | Honda | 29 |
| 5 | Sauber BMW | 17 |
| 6 | Williams-Cosworth | 10 |
| 7 | Toyota | 8 |
| 8 | Red Bull Racing Ferrari | 8 |

# Strevið støðugt at vera kroystir

**EB/Streyma liðformaðurin ásannar, at mótstøðuliðið var betri upplagt, og hann heldur tað hava týdning fyri næstu ferðirnar, at teir hóast alt megnaðu at skjóta tvey mál**

**EB/STREYMUR**

*Jóannes Hansen*

Lagið var einki serligt í EB/Streyma leguni. Eingin ivi var teirra millum um, at heimaliðið hevði verið meiri sannførandi. EB/Streyma menninir harmaðust um, at teir høvdu víst so vánaligt avrik – serliga í 1. hálvleiki:

– Vit hildu okkum vera væl fyri, men tað var skjótt, at tað kendist, at NSÍ var omaná. Vit fingu ikki frið, og tað kennist rættuliga strevið, tá ið tú støðugt verður trýstur soleiðis, sum vit vóru á miðvøllinum og í verjuni, sigur Egil á Bø, liðformaður hjá EB/Streymi.

– Fyrsta og triðja málið eru framúr væl skotin. Eg hevði ikki roknað við, at Christian Høgni fór at skjóta. Hann hevði fleiri møguleikar at spæla leysar viðspælarar, men hann valdi skotið, og tað var vorðið sum skot. Eg væntaði, at hann hevði fingið onkra skolu frá viðspælarunum, um hann ikki hevði havt fingið mál. Í sambandi við næsta málið eru vit ikki nóg ansnir í verjuni.

Hvat varð tosað um í steðginum?

– At vit skuldu vísa betri hugburð, og at vit skuldu leypa á. Vit broyttu eitt sindur upp á liðið, og vit trýstu teir eitt sindur. Vit fingu tvey mál, og vit kundu kanska havt fingið okkurt afturat, men teir høvdu eisini sínar møguleikar. At vit megnaðu at skjóta tvey mál fer at hava týdning fyri moralin. Tað hevði verið tyngri at fyrireika seg til næstu uppgávuna, um vit høvdu havt tapt stórt í Runavík, heldur Egil á Bø.

-jh